Almannamálaráðið

Løgtingið

Dagfesting:	29. september 2020
Mál nr.:	20/00804
Málsviðgjørt:	JAK
Eftirkannað:	24. september 2020

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.
(Arbeiðsgevarapartur longdur)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.
(Arbeiðsgevarapartur longdur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., sum m.a. broytt við løgtingslóg nr. 66 frá 2. mai 2003, og seinast broytt við løgtingslóg nr. 130 frá 14. august 2020, verður gjørd henda broyting:

1. Í § 20, stk. 2 verður "1. og 2. fráverudag" broytt til: "1.-4. fráverudag".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Uppskotið er ein liður í ætlanunum hjá samgonguni at tálma útreiðsluvøkstrinum í sambandi við fíggjarlógina fyri 2021. Við uppskotinum verður arbeiðsgevarum álagt at afturrinda fyri fleiri fráverudagar soleiðis, at arbeiðsgevarar frameftir skulu afturrinda fyri 1.-4. fráverudag.

1.2. Galdandi lóggáva

Dagpeningalógin er frá 2001 (Ll.nr. 74/2001), men ásetingin um, at arbeiðsgevarar skulu afturrinda landskassanum fyri 1. og 2. fráverudag, kom við Ll. nr. 66/2003 sum liður í sparingum í fíggjarlógini fyri 2003. Spurningurin um arbeiðsgevaragoldnar fráverudagar varð tó viðgjørdur í áliti frá 16. februar 2000 um nýggja dagpeningalóg. Dagpeningalógin er ikki broytt síðani 2003 hesum viðvíkjandi, hóast tað fleiri ferðir hevur verið uppi at venda at hækka fráverudagatalið, ið verður afturrindað av arbeiðsgevara.

Fíggingin av dagpeningi til løntakarar er ásett í § 20 í dagpeningalógini. Meginreglan er, at dagpeningurin verður goldin av landskassanum, men at arbeiðsgevarar afturrinda tær útreiðslur, sum standast av, at Almannaverkið rindar 1. og 2. fráverudag. Undantiknar eru støður, har eingin arbeiðsgevari er, t.d. um viðkomandi er í ALS.

Dagpeningahámarkið fyri ein dag er 960 kr., tá frítíðarløn er við. Fyri eina sjúkrafráveru er tað tí í mesta lagi talan um 1.920 kr., sum arbeiðsgevarin skal rinda. Í talvuni niðanfyri síggjast samlaðu útgjøldini í tús. kr. vegna dagpening, endurgjøld frá tryggingum v.m. vegna arbeiðsskaðar og arbeiðsgevarans partur fyri 1. og 2. fráverudag.

(tús. kr.)	**2013**	**2014**	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**
Útgjald til løntakarar	51.523	53.271	62.277	61.734	65.668	72.674	81.294
Tryggingarendurgjøld	-2.104	-5.181	-3.396	-4.374	-3.459	-3.714	-3.428
Løntakarar	***49.420***	***48.089***	***58.881***	***57.359***	***62.209***	***68.945***	***77.866***
Arbeiðsgevarans partur	-3.384	-3.141	-3.771	-3.945	-4.497	-5.022	-5.489
Netto	***46.036***	***44.948***	***55.110***	***53.414***	***57.712***	***63.923***	***72.377***

Yvirskipað ber ikki til at samanbera skipanirnar viðvíkjandi sjúkradagpeningi í Føroyum við tær í okkara grannalondum. Í øllum Norðurlondum hava løntakarar rætt til løn ella veiting undir sjúkrafráveru. Hvussu nógv og hvussu leingi er treytað av støðuni, sum løntakarin hevur á arbeiðsmarknaðinum. Høvuðstreytirnar fyri løntakarar í londunum líkjast, hóast økini eru skipað ymiskt.

Í Føroyum eru, í mun til okkara grannalond, tvær ymiskar skipanir, tá tað snýr seg sum dagpening vegna sjúku. Onnur er fyri tímalønt, og hin fyri starvsmenn. (Starvsmenn eru í høvuðsheitum fólk í føstum starvi).

Hjá tímaløntum rindar tað almenna sjúkradagpening beinleiðis til arbeiðstakaran frá fyrsta fráverudegi. Tó er galdandi skipan, at arbeiðsgevarin afturrindar tí almenna lønina fyri 1. og 2. fráverudag. Fyri starvsmenn rindar arbeiðsgevarin fulla løn alt sjúkuskeiðið. Tað vil siga, at arbeiðsgevari fær onki afturrindað frá landinum.

Í mun til treytirnar hjá arbeiðsgevarum er føroyska skipanin serstøk í norðurlendskum høpi. Í hinum norðurlondunum hava arbeiðsgevarar skyldu til at gjalda fulla løn í eitt sokallað arbeiðsgevartíðarskeið. Eftir arbeiðsgevaratíðarskeiðið er tað í høvuðsheitum soleiðis, at arbeiðsgevararin heldur fram at gjalda vanliga løn, ella okkurt slag av sjúkraløn, (t.d. dagpengasats), men tá fær arbeiðsgevarin eftirrindað ein dagpengasats frá tí almenna.

Arbeiðsgevaratíðarskeiðið í ymsu norðurlondunum er millum 10 og 30 dagar, og munur verður ikki gjørdur á, um talan er um tímalønt, fastløntar starvsmenn o.s.fr. Niðanfyri er talva við yvirliti av arbeiðsgevaratíðarskeiðnum í ymsu norðurlondunum.

Arbeiðsgevaratíðarskeið í norðurlondum

Føroyar	Danmark	Finnland	Ísland	Norra	Svøríki
2 dagar	30 dagar	10 yrkadagar	1 mðr.*	16 dagar	2 vikur

* tó treytað av starvsaldri

Tá tað snýr seg um arbeiðsgevarar hjá tímaløntum, kann sostatt staðfestast, at tað áliggur arbeiðsgevarunum í okkara grannalondum at rinda fyri munandi fleiri dagar enn hjá arbeiðsgevarum í Føroyum. Tó rinda arbeiðsgevarar í Føroyum, ið hava starvsfólk, sum ikki eru fevnd av dagpeningaskipanini, løn undir sjúku frá 1. degi og fáa onki afturrindað frá tí almenna, og hava hesi sostatt harðari treytir enn arbeiðsgevarar í øðrum londum.

Teir vinnubólkar, sum fáa dagpening eftir hesi lóg, eru í høvuðsheitum innan fiskivinnu, byggivinnu, handverk og reingerð, og í ein ávísan mun innan handilsvinnu (hjá teimum, ið arbeiða minni enn 20 tímar um vikuna fyri sama arbeiðsgevara).

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at hækka inntøkur landskassans. Við uppskotinum verður fíggjarliga byrðan fyri sjúkradagpening í størri mun løgd á arbeiðsgevaran.

Ítøkiliga broytir lógaruppskotið treytirnar hjá teimum arbeiðsgevarum, sum eru fevndir av dagpeningaskipanini, soleiðis, at teir frameftir skulu afturrinda landskassanum fyri upp til 4 fráverudagar heldur enn 2.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Í staðin fyri at afturrinda fyri 1. og 2. fráverudag skal arbeiðsgevarin sambært uppskotinum frameftir afturrinda fyri 1.-4. fráverudag. Arbeiðsgevaraparturin hækkar sostatt úr 2 upp í 4 dagar.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er eitt fylgilógaruppskot til fíggjarlógaruppskotið fyri 2021, og tað hava ikki verið stundir at senda uppskotið til ummælis.

Tað hava heldur ikki verið stundir at umrøða uppskotið við aðrar partar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Verður arbeiðsgevaraparturin hækkaður úr 2 døgum upp í 4 dagar, hækka inntøkur landskassans væntandi við uml. 5. mió. kr.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki stórvegis umsitingarligar avleiðingar. Talan kann verða um nøkur mál færri, tí hugsast kann, at í teimum málum, har sjúkraskeiðið er styttri enn 5 dagar (svarandi til dagatalið, sum arbeiðsgevari skal afturrinda), verða umsóknir um dagpening ikki sendar Almannaverkinum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur við sær, at arbeiðsgevarar skulu rinda fyri sjúkrafráveru í upp til 4 fráverudagar. Mett verður, at samlaða gjaldið frá arbeiðsgevarunum eftir hetta verður uml. 5 mió. kr.

Tó mugu tølini lagast til støðuna í tí einstaka árinum, t.d. lønarvøkstur, tal av sjúkuskeiðum o.s.fr. Hægsta gjaldið fyri eitt sjúkutíðarskeið við fýra arbeiðsgevara goldnum fráverudøgum er 3.839 kr.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Nakrir borgarar kunnu fáa truplari at fáa tilknýti til arbeiðsmarknaðin, tí tað verður dýrari hjá arbeiðsgevarum at hava starvsfólk, ið ikki hava góða heilsu, og sum ofta eru sjúk.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri skyldur Føroya sambært Hoyvíkssáttmálanum, Evropeiska mannarættindasáttmálanum og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri eitt ávíst øki í landinum.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skatt ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Arbeiðsgevarin afturrindar landskassanum tær útreiðslur, ið standast av, at Almannaverkið rindar 1., 2., 3. og 4. fráverudag sambært hesi lóg, tó undantikið í teimum førum, har eingin arbeiðsgevari er.

Til § 2
Lógin kemur í gildi 1. januar 2021.

Almannamálaráðið, 29. september 2020.

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur